# Stórur partur av fyritøkunum í Europa útbjóða tænastuna „goymsla”

**Rákið er tað sama í Føroyum, alt fleiri fyrispurningar koma um tænastuna Vøruhotell.**



*Kim Petersen, søluleiðari á MBM og Bergur Sørensen, leiðari á Vøruhotellinum hjá Eimskip saman viðeinum platti av seyðafóðuri. Ein av fleiri vørum hjá MBM á vøruhotellinum*

Í Vestureuropa hevur góð helvt av fyritøkunum lagt goymsluna út til triðja persón. Hetta er fyri at brúka tíð og orku upp á tað, sum tey eru best til. Fyritøkurnar leggja seg eftir teirra »kjarnuøki« - Core Bussiness. Enn hava ikki so nógvar føroyskar fyritøkur útbjóðað goymsluna, men gongdin er greið: Alt fleiri fyritøkur venda sær til Eimskip við fyrispurningi um fullfíggjaða goymslu- og logistikkloysn.

Fyritøkur velja ofta at fevna ov breitt, og tí verður stundum tíð og orka brúkt upp á evni, sum ikki eru partar av málinum hjá fyritøkuni. Evni, sum ikki eru inntøkufremjandi. Hesi eiga at verða skild frá og løgd út til triðja mann. Hálvan mai gjørdu MBM og Eimskip avtalu um »gisting á Vøruhotelli«, sum í fyrsta umfari ber í sær ,at MBM leggur fóður og annaði sekkjum á Vøruhotellið. MBM útbjóðar part av goymsluni til Eimskip. Søla og flutningur av hesum vørum í Suðurstreymoy, Suðuroy, Sandoy og Norðoyggjum verður framyvir samskipaður gjøgnum Vøruhotellið og MBM í Hoyvík og í Kollafirði. Sambært Kim Petersen, søluleiðara á MBM, er hetta til fyrimuns fyri bæð i MBM og viðskiftafólk teirra. »Nú er meira fokus á framleiðslu og sølu, og minni orka verður nýtt upp á goymslu og logistikk. Eisini verða kostnaðirnir broytiligir soleiðis at vit bert gjalda fyri taðvøru, vit hava á goymslu«. Í Suðurstreymoy kunnu bøndurnir avheinta fóður og annað á plattum beinleiðis á Eimskip, bert ein útflýggjan er gjørd frá MBM frammanundan.

Í heimshøpi síggja vit eina miðsavnan av goymslum. »Logistikk-økini« verða alt størri, skjótari flutningurin fer fram. Fleiri fyritøkur hava eina ella fáar goymslur fyri alt Europa.

Aðrar hava eina goymslu fyri alt Skandinavia, Føroyar íroknaðar. Eftir at keypiorkan í eystureuropeisku londunum er økt, flytir miðjan í Europa seg eystureftir. Somuleiðis flyta megingoymslurnar eysturyvir (kelda: Groenewout). Tað kann merkja. at longri verður

frá goymslunum til Føroya, og harviðkann tørvur vera á størri goymslu í Føroyum.

Eimskip bjóðar samlaða logistikk loysn við vøruhotelli og »flutningsmiðdepli« - Distribution Centre. Eimskip bjóðar tænastu við flutningi frá hurð til hurð, vørugoymslu og -stýring og koyring til triðja mann. Á Vøruhotellinum kunnu eisini virðisøkjandi framleiðslir gerast, so sum at seta deilir saman, at umpakka, at merkja og at ummerkja vøru.

# Fleiri barnabøkur frá Bókadeildini

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út fýra bøkur. Tríggjar barnabøkur og eina smábarnabók**

TÍÐINDASKRIV
*Bókadeild Føroya Lærarafelags*




### Ælabogadreymurin hjá Malju

Hetta er heldur størri bók enn vanligt, og hon snýr seg um Malju, sum liggur í fasta svøvni í lítlu song síni. Brádliga fer hon at droyma. Malja droymir, at hon fer at ferðast, og vinir hennara koma við. Í dreyminum ferðast tey í vøkrum og litríkum umhvørvi.

Bókin, sum er væl egnað til tey 0-3 ára gomlu, er 28 síður í føgrum litum, innbundin og kostar 90 kr. í bókabúðunum.

### Eg skal hava ein hund

Helena ynskir sær so inniliga at fáa ein hund, men mamman og pápin siga kortanei.

Helena finnur tí uppá ein ósjónligan hund, sum hon kallar Hussie. Saman við pápa sínum finnur hon Hussie eitt stað at sova, og hann vísir henni eisini, hvat hon skal geva Hussie at eta, tí pápin er tann einasti, sum í fyrsta umfari kennir til loyndarmál hennara.

Tá ið Helena hevur víst í verki, at hon dugir at ansa eftir einum hundi, gongur hennara hægsta ynski út…

Bókin, sum er væl egnað til tey 4-6 ára gomlu, er 58 síður, innbundin, myndprýdd og kostar 120 kr. í bókabúðunum.

### Hennara hátign Sleikisneis

Tíðrikur kongur, Aðalbjørg drotning og Petronella prinsessa búgva á slottinum. Prinsessan er ógvuliga forkelað og fær alt, sum hon vil hava. Tá ið hon fyllir átta ár, sleppur hon at velja sær okkurt, sum hon ynskir sær - og hon ynskir sær ein grís. Svínajákup verður settur at ansa grísasúnni og slotsvenja hana, men tað ringasta er, at drotningin hevur lovað, at kemur súgvin inn á slottið at búgva, rýmir hon…

### Skattaoyggin

Nú kemur sjórænarasøgan, ið ber av øllum, út á føroyskum. Hetta er ein klassikari, ið fleiri ættarlið hava lisið, síðan bókin varð givið út á fyrsta sinni í 1883. Søgugongdin byggir á eitt kort, ið ungi Jim Hawkins undir serligum umstøðum fær hendur á. Kortið er av eini oyggj, har ein skattur er grivin niður. Fleiri vilja hava hendur á skattinum. Ikki bara skiparin, góðseigarin og læknin, ið skipa ferð til Skattaoyna við skipinum Hispniola, men eisini einbeinti kokkurin, Long John Silver og hansara harkalið.

Skattaoyggin, sum er væl egnað til tey 9 ára gomlu og eldri, er 232 síður, innbundin og kostar 150 kr. í bókabúðunum. Edward Fuglø myndprýddi permuna.



# Flótandi bókasøla komin til Føroyar

**Hóskvøldið kom heimsins størsta flótandi bókasøla á Havnina. Trúboðanarskipið Doulos er komið til landið og verður her til mánadagin tann 5. juli, tá leiðin gongur til Frankaríkis. Hópin av tiltøkum verða umborð, meðan skipið er í Føroyum**

VITJAN
*Myndir: Jens K. Vang*
*Tekstur: Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Hóskvøldið kom Doulos á Havnina, har skipið skal liggja til komandi mikdag, tá leiðin síðani gongur til Klaksvíkar*

Trúboðanarskipið Doulos kom á Havnina hóskvøldið. Stór móttøka var fyri skipinum, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður helt røðu. Umborð eru tveir føroyingar, og skipið skal liggja í Havn til mikudagin í komandi viku. Tá gongur leiðin til Klaksvíkar, har skipið verður liggjandi til mánadagin 5. juli.

Meðan skipið liggur í Føroyum er tað opið allar dagarnar fyri almenninginum. Til ber at fara umborð til eina rundferð og at vitja ta stóru bókasøluna, sum er opin allar dagarnar frá klokkan 10 fyrrapartin til klokkan 22 á kvøldi.

### Fleiri tiltøk

Nógv ymisk tiltøk eru á skránni umborð á skipinum, meðan tað liggur her. Mánakvøldið verður eitt serligt tiltak fyri kvinnur, har kvinnur frá ymsum londum fara at greiða frá tí dagliga lívinum og eisini frá bíbilskum søgum.

Eitt líknandi tiltak verður so eisini týskvøldið, men tá verður tað fyri menn. Týsdagin verður somuleiðis eitt tiltak fyri børn á skránni. Klokkan 10.30 og 13 verður tað, og kallast tað eitt trúboðanarævintýr fyri børn í aldrinum átta til tólv ár.

Hjørleif Vang er umboðsmaður fyri OM, sum er felagsskapurin, sum skipið siglir fyri. Hann greiðir frá, at umborð er eisini ein stór kaffistova, har fólk kunnu seta seg niður og njóta ein heitan munn, meðan tey vitja umborð.

Mikudagin um hálvgum fýra tíðina seinnapartin fer skipið av Havnini til Klaksvíkar.

Somuleiðis ber til at vitja skipið, meðan tað liggur í Klaksvík. Leygarkvøldið verður eitt altjóða tiltak, har tað við tónleiki, leiki, sangi og dansi av ymsum slagi verður varpað ljós á ymiskar mentanir. Tað eru fólk frá øllum møguligum tjóðum umborð, so tað verða ivaleyst nógvar ymiskar mentanir á skránni. Hetta tiltakið verður tó ikki umborð á skipinum, men í KÍ høllini.

Í sambandi við tiltakið siglir Dúgvan ein eykatúr av Klaksvík til Leirvíkar á midnátt, tá tiltakið er liðugt.

Sunnudagin verður so tiltakið fyri børn aftur á skránni, og mánadagin leggur skipið leiðina til Frankaríkis.

### Søguligt skip

Doulos er upp á mangar mátar eitt søguligt skip. Tað varð bygt í 1914 og er sostatt bert tvey á yngri enn Titanic hevði verið. Tað er somuleiðis við sínum yvir 6.000 ymisku bókatitlum, sum eru í bókasøluni umborð, heimsins størsta flótandi bókasøla.

Hetta er fyrstu ferð, at Doulos vitjar í Føroyum, men onnur skip undir OM hava verið her.

Í 1983 var Logos I her, og blíðskapurin, ið tá varð sýndur teimum, gjørdi, at tey vildu koma aftur. Logos I rendi tó á land og sakk, og seinni kom so Logos II. Tað skipið vitjaði í Føroyum í 2001.

Og hósdagin kom so Doulos fyri fyrstu ferð til Føroyar. Við umborð eru tveir føroyingar. Kapteinurin Árni B. Jensen og ein kvinna, sum eitur Margith Olsen.

Nakrir føroyingar afturat fara við aftur skipinum, tá tað fer til Frankaríkis.




*Við Doulos hetta kvøldið vóru tveir føroyingar. Kapteinurin Árni B. Jensen og Margith Olsen úr Klaksvík. Mong vóru spent at síggja hana aftur*



*Stór mannamúgva var á bryggjuni og tók ímóti Doulos, tá tað kom á Havnina hóskvøldið*

# Ganga Føroyar suður og norð



*Aftur í ár verður skipað fyri gongutúri úr Akrabyrgi í Enniberg*

**Eins og undanfarin ár verður gongutúrurin úr Akrabyrgi í Enniberg á skránni. Og um nóg stór undirtøka verður fyri tí, verður eisini skipað fyri gongutúri úr eyst og vest einaferð í juli mánaði**

FERÐAVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fyri triðju ferð verður hesin gongutúrurin aftur á skránni. Túrurin byrjar leygardagin 3. juli og endar leygardagin 10. juli.

Kunningstovan í Havn hevur í samstarvi við hinar kunningarstovurnar og gongufeløgini kring landið gjørt av at bjóða áhugaðum eina uppliving fyri lívið, verður sagt av kunningarstovuni.

Ætlanin er at fylgja varðagøtunum og at hava staðkendir ferðaleiðarar við, ið kunnu greiða frá um søgu og sagnir á leiðini. Tey, ið fara við, mugu hava soviposa og ryggsekk við. Gist verður á vallaraheimi og ella gistingarhúsi.

Í 2000 og 2001 varð gingið úr Akrabyrgi í Enniberg. Men í 2002 høvdu fólk hug at royna at ganga av Eystfelli í Mykineshólm. Tveir spennandi túrar við søgum , sagnum og stórbærari náttúru, sigur kunningarstovan í tíðindaskrivi.

Øll, ið orka at ganga 5-7 tímar um dagin í eina viku, kunnu koma við. Tað ber eisini til at tekna seg fyri partar av túrinum, um so er at tíðin ikki loyvir einum at vera við allan túrin.

Um áhugi er fyri tí, verður eisini gingið eystur-vestur seinni í juli. Til ber at tekna seg á Kunningarstovuni á tlf 315788 ella á visittorshavn@visittorshavn.fo